

Benny og Flemming Samuelsen hyggja í nýggju Dimmu.

Myndir: Jens Kr. Vang



Ábyrgdarblaðstjórin á Sosialinum, Jan Müller, saman við Benny og Flemming Samuelsen



Ingi og Hjalgrím Samuelsen skoða baksíðuna á nýggju útgávuni

# Blaðstjórar sakna stór bløð

**Tveir blaðstjórar, sum í meira enn hálva øld hava skrivað og framleitt tabloidbløð, halda, at føroyski blaðheimurin er blivin eitt sindur fátæksligari, nú einki føroyskt blað kemur út í stórari stødd**

DIMMA
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Seinnapartin mánadagin var Dimmalætting fyri fyrstu ferð prentað í tabloid-stødd. Og tað var ein minni Dimma við nýggjari uppseting, sum lesarar hjá blaðnum kundu taka upp í hondina mánakvøldið.

Ábyrgdarblaðstjórarnir á Sosialinum og Norðlýsinum hava samanlagt skrivað og framleitt bløð í tabloidstødd í meira enn hálvthundrað ár, og teir eru báðir eitt sindur keddir um, at einki broadsheet-blað nú kemur út í Føroyum.

### Djarvt stig at taka

– Føroyski blaðheimurin er blivin eitt sindur fátæksligari, nú øll bløðini koma út í somu stødd. Fyri nøkrum mánaðum síðani høvdu føroyingar tvey bløð í broadsheet-stødd, men nú er einki eftir. Blaðheimurin er blivin eitt sindur meira einstáttaður, og tað er spell. Tað er líka við, at eg sakni gomlu Dimmu í morgun, sigur Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóri á Sosialinum.

– Men so skal eg eisini siga, at eg haldi tað var djarvt og spennandi av Dimmalætting at taka stigið og koma út í minni stødd. Hóast vit eru kappingarneytar, so ynski eg teimum góða eydnu við blaðnum, og eg eri sannførdur um, at tað er pláss fyri tveimum stóru dagbløðum í Føroyum, sigur hann.

### Roknar ikki við størri sølu

Oliver Joensen, sum er ábyrgdarblaðstjóri á lokalblaðnum Norðlýsinum, tekur undir við sjónarmiðinum um, at bløðini í Føroyum nú eru meira einstáttað, men hann ivast í, um Dimma við nýggju útgávuni fer at fáa fleiri lesarar.

– Eg haldi, at nýggja Dimma er snøgg, men fyri mær tykist tað, sum at Dimma við hesum kompaktformati hevur valt ein ávísan málbólk burturúr og ikki appelerar so nógv til breiddina ella teir yngru lesararnar. Tí dugi eg ikki at síggja, at hendan nýggja Dimma fer at selja meira bløð enn tann gamla, sigur Oliver Joensen.

– Dimma líkist nógv Informatión, og hon virkar ikki sum eitt nýtt blað, sum við innihaldinum appelerar til teir yngru lesararnar, sigur hann.

# 65 umsóknir fingu blankt nei

**Rakel Helmsdal hevur fingið starvsløn í trý ár, meðan Tróndur Bogason, Carl Johan Jensen og Hansina Iversen eru millum hini listarfólkini, sum í ár fáa starvslønir frá Mentanargrunni Landsins. 65 av 81 umsóknum fingu noktandi svar**

STARVSLØNIR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað var ein ordans uppgáva, sum nevndin fyri Mentanargrunn Landsins hevði, tá ið nevndin skuldi velja fólk at fáa almenna starvslønir í ár.

81 umsóknir vóru komnar til Mentanargrunn Landsins, og tað var frammanundan greitt, at bara ein lítil partur av hesum umsóknum kundu játtast.

Í gjár gjørdist tað greitt, at 18 av teimum 81 umsóknunum fáa pengar, meðan 65 umsóknir fingu noktandi svar.



*Rithøvundin Rakel Helmsdal hevur fingið almenna starvsløn í trý ár*

### Rakel fekk trý ár

Ein starvsløn fyri trý ár varð latin, og hana fekk rithøvundin Rakel Helmsdal. Listakvinnan Aggi Ásgerð Ásgarðsdóttir og tónaskaldið Tróndur Bogason fingu eitt ára starvsløn hvør, og eitt hálvt ár varð latið listarkvinnuni Hansinu Iversen og rithvøundunum Carl Johan Jensen og Petur Elias Askham Guttesen.

Harafturat fingu tvey myndlistafólk samanlagt seks mánaðir starvsløn, fimm tónlistafólk fingu samanlagt 12 mánaðir, sjónleikarvirksemið fekk fýra mánaðir og annað mentanarligt virksemi fekk fimm mánaðir starvsløn.

### 21.000 um mánaðin

Mentangrunnur Landsins kann lata upp í helvtina av sínari árligu játtan frá landinum til starvslønir, og politikkurin hevur seinnu árini verið, at hendan heimild verður brúkt til fulnar, so at helvtin av pengunum á hvørjum ári fara til starvslønir.

Í ár lat Mentanargrunnur Landsins samanlagt 81 mánaðir í starvsløn, og tað svarar til 1,73 milliónir krónur.

Tey, sum fáa starvslønir frá tí almenna, fáa góðar 21.000 krónur í løn um mánaðin.

### Fakta

Mentanargrunnur Landsins hevur latið starvslønir til 18 umsóknir. Tey, sum fingu longstu starvslønirnar, vóru hesi:

| | |
|---|---|
| Rakel Helmsdal rithøvundi | 3 ár |
| Tróndur Bogason tónaskald | 1 ár |
| Aggi Ásgerð Ásgarðsdóttir listakvinna | 1 ár |
| Carl Johan Jensen rithøvundi | 6 mánaðir |
| Hansina Iversen listakvinna | 6 mánaðir |
| Petur Elias Askham Guttesen rithøvundi | 6 mánaðir |

Harafturat vóru styttri starvslønir latin til 12 aðrar umsóknir.

Samanlagt vóru starvslønir lætnar fyri 1,73 milliónir krónur.

## Leiðarin einsamallur til arbeiðis

**Síðani Helgi Fossádal byrjaði sum leiðari á Listasavni Føroya, hevur hann verið einsamallur til arbeiðis á savninum. Hini bæði starvsfólkini hava verið og eru framvegis sjúkrameldað**

LISTASAVNIÐ
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Helgi Fossádal hevur verið leiðari á Listasavni Føroya síðani 1. mars, og hesar tvær vikurnar hevur hann verið einsamallur til arbeiðis á savninum.

*Tað skilst, at hini bæði starvsfólkini á Listasavninum hava verið sjúkraskrivað, síðani tú komst til arbeiðis. Passar tað?*

– Ja, eg kann vátta, at eg havi verið einsamallur til arbeiðis, síðani eg byrjaði. Hini bæði starvsfólkini hava verið sjúkraskrivað og eru tað í eina tíð afturat.

*Hvussu ber tað til?*

– Tað kann eg einki siga um, men tað er greitt, at tað ber illa til at halda fram einsamallur til arbeiðis.

### Listfrøðingur í starvi

Annað av hinum starvsfólkunum er listfrøðingurin Inger Smærup Sørensen. Hon søkti eisini starvið sum leiðari á savninum, men síðani Helgi Fossádal kom til arbeiðis, hevur hon verið sjúkraskrivað.

Dimmalætting skrivað í gjár, at Inger Smærup Sørensen ikki er sett í starv sum listfrøðingur, men skal virka sum ráðgevi á Listasavninum. Hesum vísir ein avgjørdur Helgi Fossádal aftur í einum tíðindaskrivi, sum hann sendi út í gjár.

– Á stýrisfundi 25. mai 2004 var Inger Smærup Sørensen sett í starv sum listfrøðingur á Listasavni Føroya, og staðfesti undirritaði hetta í skrivi 1. mars 2005, sigur Helgi Fossádal í tíðindaskrivi, har hann endurgevur skrivi og staðfestir, at starvsheitið hjá Inger Smærup Sørensen er listfrøðingur.